

*Við á framsýningini á Varmakeldu hevur Vibeke Fonnesberg myndir av øllum borgarstjórunum í Fuglafirði síðan 1972*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Vibeke málar býráðsformenninar

**Danska listakvinnan, Vibeke Fonnesberg, letur upp málningaframsýning í fundarhølinum hjá Fuglafjarðar kommunu í dag**

VARMAKELDA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í samband við listafagnaðin, sum verður í Fuglafirði á Varmakeldu, letur danska listarkvinnan, Vibeke Fonnesberg, forvitnisliga framsýning upp í býráðssalinum í Fuglafirði í kvøld klokkan 18.

Seinastu trý sumrini hevur listarkvinnan vitjað í Føroyum, og her hava náttúran og menniskja bergtikið hana.

Vibeke Fonnesberg málar bæði landsløg og portrettir.

Seinasta summar setti hon sær fyri at mála portrettir av "føroyskum" andlitum, og á framsýningini í Fuglafirði hevur hon eitt nú portrettir av teimum fimm borgarstjórunum, sum verið hava í Fuglafirði, síðan nýggja kommunuskipanini kom í gildi í 1972. Aftrat hesum portrettum hevur hon eisini nakrar náttúrulýsingar.

# Fuglafjørður havt kunningarstovu í 10 ár

**Petur Martin Petersen, leiðari á kunningarstovuni, sigur, at hesi 10 árini hava einir 20.000 útlendingar vitjað inn á gólvið, og talið av føroyingum hevur ikki verið minni. - Vit kunnu tí siga, at kunningarstovan hevur verið eitt hitt mest internationala staðið í Fuglafirði hesi árini**

VARMAKELDA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í Fuglafirði standa eini snotilig hús úr gróti. Hetta er gamli skúli, sum í meira enn 50 ár var einasti skúli í bygdini. Tá ið nýggjur skúli kom í 1937, bleiv gamli skúli kommunuskrivstova og goymslurúm hjá kommununi. Seinni í fimtiárunum bleiv bókasavn gjørt í norðraru helvt. Í sjeytiárunum flutti kommunan sína skrivstovu í onnur hús, og allur skúlin bleiv gjørdur til bókasavn.

Í 1994 settu fólk í Fuglafirði saman við kommununi eina kunningarstovu á stovn.

Petur Martin Petersen, leiðari á kunningarstovuni, sigur, at stovan í fyrstu atløgu varð ætlað sum ein hjálpandi hond til handlar, vinnurekandi og frítíðarfelagskapir, sum av og á kundu hava brúk fyri eini skrivstovu, ið kundi marknaðarføra teirra áhugamál.

- Nógv varð ikki gjørt burtur úr, tá ið latið varð upp í mai mánaði 1994. Kunningarstovan fekk innivist í forstovuni hjá bókasavninum, og fyri 1 krónu vórðu búnyttur keyptar frá Føroya Banka, sum um hetta mundið legði fleiri deildir niður kring landið.

## Veksandi áhugi

Leiðarin vísir á, at tað gekk ikki long tíð, til tørvur var á meira enn bara at vegleiða um handilsviðurskifti á staðnum.

- Longu fyrsta árið komu fleiri útlendsk ferðafólk inn á gólvið. Hesi sóknaðust eftir øllum møguligum upplýsingum og tænastum, sum ein vanlig kunningarstova eftir teirr tykki eisini átti at taka sær av.

Hann sigur, at hetta hevði við sær, at kunningarstovan nú í stóran mun eisini fór at leggja seg eftir at gera upplýsandi ferðamanna tilfar um økið - og hetta bleiv sera væl móttikið.

- Vit fóru nú eisini undir at skapa eitt samstarv millum kunningarstovur aðrastaðir í landinum, soleiðis at hesar – heldur enn at kappast – kundu samstarva um felags tiltøk.

Petur Martin heldur, at hóast fólk onkuntíð enn kunnu vera eitt sindur ymisk á máli um, hvat best er at gera innan ferðavinnuvegleiðing, er tó eingin ivi um, at flestu kunningarstovur eru komnar fyri at vera.



*Leiðari á kunningarstovuni í Fuglafirði, er Petur Martin Petersen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

- Við tað, at trupult mangan kann vera við fíggin av

hesum virksemi, hava summar kommunur nú valt sjálvar at fíggja tað, sum hesi støð nú einaferð krevja av peningi.

Hann sigur, at í Fuglafirði er tað bókasavnið, sum bæði hýsur og samstarvar við kunningarstovuna, soleiðis at bæði støðini kunna hava nógv meira opið enn frammanundan – og um tey arbeiddu hvør í sínum lagi.

- Aðrastaðni hava menn valt aðrar hættir at gera hesa tænastu best møguliga við ymsum slagi av samstarvi við kommunalar tænastur, sigur hann.

## Felagsskapur

Leiðarin vísir á, at árið eftir, at kunningarstovan í Fuglafirði sá dagsins ljós, varð Ferðavinnan í Eysturoy stovnað sum ein ferðavinnuáhugafelagskapur, har allar kommunur í oynni vóru við. Samstundis varð kunningarstova latin upp i Runavík.

- Hesar báðar kunningarstovurnar hava frá fyrsta degi arbeitt fyrimyndarliga væl saman um – ikki bara um lokal áhugamál í teirra egnu heimbýum, men eisini fyri alla oynna, sum jú luttekur í rakstrinum av kunningarstovunum. Seinastu tvey árini hava vertskommunurnar tó goldið bróðurpartin av rakstrinum av kunningarstovunum, soleiðis at Ferðavinnan í Eysturoy kann hava nakað av peningi at hjálpa til við kring um í oynni.

Petur Martin sigur, at í byrjanini var talið av vitjandi nøkur fá hundrað um árið, men sum tíðin er liðin, er talan um fleiri túsund, sum støkka inn á gólvið at spyrja eftir øllum hugsandi og óhugsandi, sum ein kunningarstova eigur at kunna vegleiða um.

Hann sigur, at seinnu árini eru føroyingar eisini farnir at brúka kunningarstovurnar nógv meira enn í byrjanini.

- Eitt nú verða fleiri gongufeløg nú rikin av kunningarstovunum og eins og aðrastaðni, har kunningarstovur eru, verður kunningarstovan í Fuglafirði eisini brúkt sum lýsingardepil fyri øll møgulig lokal tiltøk.

## Varmakelda

Petur Martin sigur, at Varmakeldan krevur nógv av kunningarstovuni.

- Her skulu vit kunna vegleiða øllum stevnugestunum best møguligt um alt, sum fer fram. Uppsløg av øllum handa slagi eru soleiðis at finna á kunningarstovuni.

Hann vísir á, at í ár er serliga nógv á skránni, tí aftrat vanligu stevnuni er eisini 35-ára hald hjá listarfelgnum á staðnum.

- So, tað er ikki hissini av spennandi avbjóðingum hjá okkum, sum onkursvegna skulu kunna svara fólki upp á alt, sum tey vilja vita um tiltøk og tilboð á plássinum.

Petur Martin sigur, at hesi 10 árini, kunningarstovan hevur verið virkin, hava einir 20.000 útlendingar vitjað inn á gólvið, og talið av føroyingum hevur ikki verið minni.

- Vit kunnu tí ikki siga annað enn, at kunningarstovan hevur verið eitt hitt mest internationala staðið í býnum, samstundis sum hon í fult mát eisini røkir heimliga tørvin.

Leiðarin sigur, at samstarvið millum bókasavnið og kunningarstovuna hevur øll árini givið hesum báðum stovnum møguleika til at veita eina nógv betri tænastu, enn møguligt hevði verið, um stovnarnir arbeiddu hvør sær.

- Eisini í ár fer kunningarstovan í Fuglafirði at hava nógv opið, meðan Lista- og Varmakeldustevnan er. Vit fara at vera stevnugestunum til hjálpar við øllum hugsandi spurningum, sigur Petur Martin Petersen, sum bjóðar øllum at vera hjartaliga vælkomin til Fuglafjarðar um vikuskiftið.



SKEMMAN

## Søkir skrivstovulærling

Søkt verður eftir skrivstovulærlingi at byrja 1. september 2004.

**Vit bjóða:**
Eitt skiftandi og spennandi arbeiðið, har tú fært ábyrd fyri egnum øki.
Løn sambært galdandi sáttmála við S & K.

**Vit vænta at tú ert:**
samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining

**Kunning um Skemmuna:**
Ì Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Ísland, Canada, Letland, Litavia og Estonia. Ì hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 17 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 500 arbeiðspláss tilsamans á øllum deildunum í teimum 6 londunum.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram á Føroya Handilsskúla.

**Krøv:**
Fyri at gerast skrivstovulærlingur í Skemmuni krevst at tú hevur FHS- ella onnur miðnámsútbúgving.

**Nær skalt tú byjra?**
Tú skalt byrja 1. september 2004.

**Hevur hetta tín áhuga:**
Send so eina skrivliga umsókn innan 24. juli til:

SKEMMAN
Staravegur 7
Postboks 3278
110 Tórshavn
Tel.315588
Mail: skemman@skemman.fo

SKEMMAN

## Søkir handilslærling

Gerst handilslærlingur hjá okkum og fáa nógvar fyrimunir!

**Vit bjóða:**
- Møguleika fyri altjóða útbúgving
- Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
- Møguleika fyri arbeiði við stórum avbjóðingum - bæði í Føroyum og á eini av deildunum í útlandinum
- Løn sambært galdandi sáttmála hjá S&K

**Vit vænta at tú ert:**
samstarvsfús/ur, sjálvstøðug/ur, fyrikomandi arbeiðssom/-samur, opin og ikki bangin fyri at siga tína meining

**Kunning um Skemmuna:**
Í Skemmuni starvast 14 fólk. Eisini hevur Skemman deildir í hesum londum: Ísland, Canada, Letland, Litavia og Estland. Ì hesum londum lata vit eisini fleiri nýggjar deildir upp á hvørjum ári. Síðan Skemman byrjaði fyri 17 árum síðan, eru arbeiðsplássini økt støðugt. Í dag eru umleið 500 arbeiðspláss tilsamans á øllum deildunum í teimum 6 londunum.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmark.
Gjøgnum samstarvið við Jysk, fáa okkara lærlingar loyvi at koma á Jysk skúlan í Norður-Jyllandi, og tí fáa teir ein nógv størri fakligan kunnleika um okkara vørur, enn ein fær gjøgnum eina vanligan handilsútbúgving.
Skúlin er góðkendur av almennu myndugleikunum.

**Krøv:**
Fyri at gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS-útbúgving ella onnur miðnámsútbúgving.

**Nær skalt tú byjra?**
Lærlingurin skal byrja 1 Septembur.

**Hevur hetta tín áhuga:**
**Send so eina skrivliga umsókn innan 24 Juli til:**

SKEMMAN
Staravegur 7
Postboks 3278
110 Tórshavn
Tel.315588
Mail: skemman@skemman.fo

JÚST NÚ HAVA VIT
SUPER
BRÚKTBILATILBOÐ,
OG LATA HEILT UPP Í
30.000,-
Í AVSLÁTTRI

| | |
|---|---|
| **MAZDA 323 P 1.3i LX H/B** | **Kr. 65.000,-** |
| Grønur · 3 hurðar · 5 gear · km. 110.000 · árg. apr 97 · sýnaður feb 04 | |
| **MAZDA 323 1.5i GLX** | **Kr. 76.000,-** |
| Brúnur · 4 hurðar · 5 gear · km. 56.000 · árg. jun 98 · sýnaður nov 03 | |
| **MAZDA 323 S** | **Kr. 110.000,-** |
| Bláur · 4 hurðar · 5 gear · km. 95.000 · árg. jul 01 · nýsýnaður | |
| **MAZDA 323 1.3i LX** | **Kr. 80.000,-** |
| Bláur · 4 hurðar · 5 gear · km. 106.000 · árg. apr 99 · nýsýnaður | |
| **MAZDA 323 S 2.0 Diesel LX** | **Kr. 115.000,-** |
| Bláur · 4 hurðar · 5 gear · km. 60.000 · árg. sep 99 · sýnaður mai 04 | |
| **MAZDA 323 S 2.0 Diesel LX** | **Kr. 69.000,-** |
| Bláur · 5 hurðar · 5 gear · km. 150.000 · árg. jun 98 · sýnaður nov 03 | |
| **MAZDA 323 Sedan 1.5i** | **Kr. 94.000,-** |
| Silvur · 4 hurðar · 5 gear · km. 87.000 · árg. jun 99 · nýsýnaður | |
| **MAZDA 323F 1.8i GLX** | **Kr. 75.000,-** |
| Grønur · 5 hurðar · 5 gear · km. 150.000 · árg. apr 98 | |
| **MAZDA 626 1.8i LX** | **Kr. 55.000,-** |
| Svartur · 4 hurðar · 5 gear · km. 176.000 · árg. sep 92 · sýnaður okt 03 | |
| **MAZDA 626 2.0 Sedan GLX** | **Kr. 45.000,-** |
| Grønur · 4 hurðar · 5 gear · km. 79.000 · árg. jul 92 · sýnaður mai 04 | |
| **MAZDA 626 GLX 2.0 DiTD Diesel** | **Kr. 128.000,-** |
| Grønur · 5 hurðar · 5 gear · km. 167.000 · árg. jul 00 · sýnaður mai 04 | |
| **MAZDA Demio 1.5 GLX** | **Kr. 75.000,-** |
| Grønur · 5 hurðar · 5 gear · km. 112.000 · árg. jan 99 · sýnaður mai 04 | |
| **BMW 320i** | **Kr. 90.000,-** |
| Svartur · 4 hurðar · 5 gear · km. 116.000 · árg. okt 92 · sýnaður jan 04 | |
| **CITROEN ZX 1.4i** | **Kr. 57.000,-** |
| Gráur · 2 hurðar · 5 gear · km. 95.000 · árg. sep 96 · sýnaður mai 04 | |
| **FORD Escort 1.6** | **Kr. 53.000,-** |
| Reyður · 5 hurðar · 5 gear · km. 65.000 · árg. jun 95 · sýnaður mai 04 | |
| **FORD Mondeo H/B** | **Kr. 56.000,-** |
| Gráur · 5 hurðar · 5 gear · km. 153.000 · árg. sep 96 · sýnaður mai 04 | |
| **HONDA Civic 1.4i S** | **Kr. 90.000,-** |
| Gráur · 5 hurðar · 5 gear · km. 65.000 · árg. 98 · sýnaður nov 03 | |
| **KIA Sephia 1.5i GLX** | **Kr. 57.000,-** |
| Bláur · 4 hurðar · 5 gear · km. 70.000 · árg. mai 98 · sýnaður nov 03 | |
| **NISSAN Primera 2.0D SLX Diesel** | **Kr. 59.000,-** |
| Hvítur · 4 hurðar · 5 gear · km. 188.000 · árg. apr 95 · sýnaður feb 04 | |
| **OPEL Astra 1.6** | **Kr. 60.000,-** |
| Beige · 4 hurðar · 5 gear · km. 111.000 · árg. mar 98 · sýnaður feb 04 | |
| **OPEL Astra 1.7 Diesel Station Car** | **Kr. 35.000,-** |
| Bláur · 5 hurðar · 5 gear · km. 170.000 · árg. feb 92 · nýsýnaður | |
| **OPEL Vectra 2.0 DITD STW** | **Kr. 140.000,-** |
| Bláur · 5 hurðar · 5 gear · km. 105.000 · árg. des 99 · nýsýnaður | |
| **SUZUKI Baleno 1.6i GLX** | **Kr. 95.000,-** |
| Grønur · 4 hurðar · 5 gear · km. 49.000 · árg. feb 00 · umsýn | |
| **TOYOTA Avensis 1.8 terra Station** | **Kr. 130.000,-** |
| Gráur · 4 hurðar · 5 gear · km. 86.000 · árg. mar 99 · sýnaður sep 03 | |
| **TOYOTA Carina Sedan Automatic** | **Kr. 45.000,-** |
| Reyður · 4 hurðar · aut. gear · km. 138.000 · árg. jun 92 · sýnaður apr 04 | |
| **TOYOTA Corolla 1.3i LX** | **Kr. 80.000,-** |
| Gráur · 4 hurðar · 5 gear · km. 84.000 · árg. feb 98 · nýsýnaður | |
| **TOYOTA Corolla 1.3i LX** | **Kr. 10.000,-** |
| Bláur · 4 hurðar · 5 gear · km. 135.000 · árg. okt 90 · sýnaður jul 03 | |
| **VØRUVOGNAR** | |
| **MAZDA B2500 std cab** | **Kr. 90.000,-** |
| Hvítur · 2 hurðar · 5 gear · km. 38.000 · árg. apr 99 | |
| **MAZDA B2500 4x4 StrechCab Turbo** | **Kr. 170.000,-** |
| Bláur · 2 hurðar · 5 gear · km. 25.000 · árg. mar 02 | |

BERG MOTORS
STARAVEGUR 1-3 • TEL 31 35 35 • FAX 31 77 35 • WWW.BERGMOTORS.FO

Sosialurin 341800

## Norðskála-Oyrar skúli

Vegna farloyvi, lækkað tímatal og næmingar við serligum tørvi, verða hesi lærarastørv lýst leys at søkja:

1 fulltíðarstarv
1 starv 10–12 t/v

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið og eru tíðaravmarkað til skúlaárið 2004/2005.

Søkt verður eisini eftir stuðli 20 t/v til næmingar við serligum tørvi til tíðaravmarkað starv 1. august 2004 til 30. juni 2005.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknirnar skulu vera skúlastýrinum í hendi innan 15. juli 2004.

**Skúlastýrið**
v/ Nomi Jacobsen
FO-460 Norðskáli

## Bygningur í miðbýnum til leigu



Tygum kunnu seta tygum í samband við undirritaða á tlf. 317920 ella 313536.

**Høgni Lützen**
**P/F Valdemar Lützen**